## *Viðmerkingar frá 3. Hálvleiki:*

- *Lýsing frá HB: »Ókeypis stig kunnu avheintast í Gundadali«*
- *HB stovnað í 1904 og sovnað við 1-4*
- *Sådan, FC Suðuroy, koyr HB í skápið. Hvat siga havnarmenn nú? »Bygdamenn«*

## Klaksvík er steypavinnari

Klaksvíkar Talvfelag staðfesti aftur um vikuskiftið, at teir eru stinnasta talvfelagið í landinum í løtuni. FM-vinnararnir gjørdu bart og vunnu steypakappingina. Klaksvíkingar løgdu út sum eitt óløgi við at vinna fyrstu fýra dystirnar við fullum stigatali. Men sum kappingin leið, dróg samanum í oddinum, har havnamenninir treyðugt rann aftaná. Talan gjørdist um eina sanna finalu. Tá eitt umfar restaði í, hevði Havnin lagt seg á odda við ½ stigi, og seinasta umfarið var móti Klaksvík. Klaksvík vann 5-1 í seinasta umfarinum. Klaksvíkingar vunnu steypakappingina í 2007, 2009 og 2010. Havnin vann í 2008.



# Vit verða nummar fimm



**HONDBÓLTUR** **Pole J. Hansen tók við venjarastarvinum hjá Team Klaksvík fyri einari viku síðan. Hann ræðist ikki uppgávuna, og stúrir als ikki fyri, at kappingarárið verður ein vanlukka**

Uni Holm Johannesen

Pole J. Hansen verður biðin um at gita, hvar í røðini Team Klaksvík verður við kappingarenda.

– Vit verða nummar fimm, er hann skjótur av svara.

Í Klaksvík brynjar best mansliðið í býnum seg til eitt strævið kappingarár í bestu deildini. Fyri fyrstu ferð nakrantíð skal besta mansliðið hjá Team Klaksvík royna seg millum teir bestu í Føroyum.

Maðurin við evstu ábyrgdini av liðnum er Pole J. Hansen. Hann var settur sum venjari í farnu viku. Hann ræðist ikki stóru avbjóðingina, sum hinvegin er orsøkin til, at tók av tilboðnum.

Pole J. Hansen og leikararnir fyrireika seg nú til uppgávurnar, sum standa fyri framman.

### Fara at verja

Púra óroyndir fara klaksvíkingar at bjóða teimum royndu av.

Tað verður helst ein torfør uppgáva hjá venjaranum. Og tað staðfestir hann eisini.

– Vit hugsa fyrst og fremst um at verja. At standa rætt í verjustøðu og geva mótstøðuliðunum so lítið pláss, sum tilber. Tað er serliga tað, sum vit leggja dent á í venjingunum í løtuni. Tað verður torført, og tí skulu vit verja okkum frægast, greiðir Pole J. Hansen frá.

Tveir útlendingar eru í hópinum. Damir Oros, sum hevur roynt seg í føroyskum hondbólti í drúgt áramál, verður spælandi hjálparvenjari, og felagið kunngjørdi í farnu viku, at Zarko Pejovich úr Bosnia er knýttur at hópinum.

Pole J. Hansen er týðiliga bilsin av leikarahópinum.

– Eg hevði ikki væntað, at eg skuldi stjórna einum so dugnaligum liði. Eg eri bilsin av leikarunum, sum standa seg væl betri, enn eg hevði væntað, sigur Pole J. Hansen.

Hann vísir á, at Zarko Pejovich fer at hjálpa klaksvíkingum væl í hesum kappingarárinum.

### Ræðist ikki

Fyrstu uppgávan hjá Team Klaksvík í hesum kappingarárinum verður helst møtumikil.

Hin 27. september vitja greipuvinnararnir úr Neistanum í Klaksvík, og tá fáa klaksvíkingarnir seg av álvara royndar.

Pole J. Hansen stúrir ikki fyri, at kappingarárið verður ein vanlukka.

– Nei, tað hugsi eg als ikki. Málið hjá okkum er at vinna nakrar landskappingardystir, og annars at vaksa við uppgávunum. Vit ætla at strívast og strevast og hugsa ikki um, at vit verða botnproppur, tá kappingarárið er liðugt. Nú fara vit at bretta upp ermar og stríðast, sigur Pole J. Hansen.

### TEAM KLAKSVÍK

Felagið varð stovnað hin 12. september í 2006.

Formaður er Fríðin Ziskason

Endamálið var, at menn og dreingir skuldu hava møguleikan at spæla hondbólt í Klaksvík

Besta mansliðið spældi í triðbestu deildini í 2006/2007 og vann sær uppflyting.

Liðið spældi í næstbestu deildini í tvey kappingarár, men flutti upp í bestu deildina í vetur

Millum spælararnar, sum hava spælt við, eru Allan Mørkøre, Meinhardt Joensen, Jákup Mikkelsen, Jens Martin Knudsen og John Petersen, sum hava spælt á føroyska landsliðnum í fótbólti

## KLUMMA

# Hvat ætlar B36?



Uni Holm Johannesen

Sámal Ímundarson, formaður í B36, var greiður, tá venjaraskiftið var kunngjørt.

– Vit vilja meira og síggja ikki nakra betring, segði hann.

Allan Mørkøre loysti Sigfríð Clementsen av sum venjari í B36 í farna mánaða. Liðið hevur síðan vunnið lítið sannførandi á FC Suðuroy á heimavølli, tapt óuppiborið á útivølli móti Víkingi, og varð nærmast klætt úr við Margáir í gjár.

Venjaraskiftið hevur ikki rínt við alt fyri eitt. B36 hevur tapt móti kappingarneytunum um plássið í Evropa. Málsetningurin um evropiska luttøka er við at fara úr eygsjón.

Men hvat ætlar B36 nú?

Kurt Mørkøre, Heðin Askham, Mikkjal Thomassen, Sigfríður Clementsen og Allan Mørkøre hava verið venjarar hjá B36 síðan 2007.

Eingin hevur fingið meira enn eitt ár í starvinum. Eingin hevur havt møguleikan at lagt eitt grundarlag undir besta mansliðnum hjá felagnum. Eitt felag, sum skal stríðast millum trý tey fremstu á hvørjum ári annað er ikki nøktandi.

B36 hevði eitt sera vánaligt kappingarár í fjør, og nógv bendir á, at árið í ár verður eisini miseydnað.

Hvat ætlar felagið at gera í komandi ári? Verður Allan Mørkøre venjari? Verður nýggjur venjari settur, sum skal byrja av nýggjum?

– Eg haldi, at eg havi fingið ov stutta tíð, og tað er ikki heilt fair, men B36 er trýst frá ymsum síðum. Tað tykist mær, sum at B36 vildi hava meg at gera gand, men eg eri eingin gandakallur, eg eri ein fótbóltsvenjari, segði Sigfríður Clementsen.

Í fótbólti loysir tað seg ikki bara at liva í løtuni. Tað ræður um at hugsa fleiri ár fram.

Hvør skal mynda liðið komandi árini? Spælir Hjalgrím Elttør við B36 komandi ár? Hvør skal lyfta arvin sum lokala B36-hjarta eftir Jákup á Borg, Herbert í Lon Jacobsen og Klæmint Matras? Hvør er ætlanin við Stig-Roar Søbstad?

Tað hevur B36 ikki dugað nóg væl seinastu árini.

Tí noyðist leiðslan at gera greitt, hvat felagið ætlar. Hvør ætlanin er komandi árini? Hvør skal stjórna ætlanini?

Viðhaldsfólkini eru ikki nøgd, og tey vita ikki, um tað er nakað at síggja fram til.